## Siemens sigur upp

Altjóða fíggjarkreppan rakar eisini danska vindmylluídnaðin. Fyritøkan LM Glasfiber, sum ger veingir til vindmyllur, boðaði herfyri frá, at hon hevði sagt 450 starvsfólkum úr starvi, og í gjár kunngjørdi Siemens Wind Power, at 400 av hennara medarbeiðarum í Danmark missa arbeiðið. Andreas Nauen, stjóri í Siemens Wind Power, segði í gjár, at fyritøkan væntar sær nógv av orkupolitikkinum hjá nýggju stjórnini í USA, men at tað fer at taka tíð, áðrenn tann politikkurin sæst aftur í eftirspurninginum og framleiðsluni.

## Trupult hjá fiskimonnum

Tað kemur grønlendskum fiski- og útróðrarmonnum illa við, at Royal Greenland hevur lækkað prísin á toski munandi, soleiðis at hann nú liggur millum góðar tríggjar og fimm krónur kilo. Ein av útróðrarmonnunum, Erik Egede í Nuuk, sigur við kringvarpið KNR, at tann lági prísurin ger tað trupult at vera útróðrarmaður. Sjálvur heldur hann, at kanska eiga menn at taka seg saman um størri bátar fyri at fáa betri lønsemi. Men úrslitið kann eisini blíva, at menn fara aftur til smærri bátar, sum brenna minni, sigur hann.

# sjógv í maskinrúmið

til at stjórað menninar av skipinum og umborð á Tjaldrið ella Brimil, sum eisini kom á leiðina leygarkvøldið.

Sum skipari við ábyrgd av skipi og manning, heldur Benadikt, at tað hevði verið ógvuliga keðiligt at tikið fólkið av Grími Kamban í myrkrinum og ringu líkindunum sum vóru.

- Menn vóru troyttir, men teir vóru sinniligir og allir royndu sítt besta. Eg haldi, at manningin gjørdi alt, ið gerast kundi fyri at bjarga sær sjálvum og skipinum í støðuni, vit vóru í.

Meðan náttin leið, hevði Tjaldrið enda á Grími Kamban og royndi at halda skipinum uppí, so minni sjógvur gekk á skipssíðuna.

- Tá tað lýsti morgunin eftir var veðrið batnað, og tá kundu vit fáa fáa pumpur av Brimli. Líkindi vóru nú at seta gummibátin hjá Brimli út, og soleiðis kundu pumpur førast yvir á Grím Kamban.



*Eini 40-50 tons av sjógvi vóru í maskinrúminum á Grími Kamban, men líkt er ikki til, at hetta hevur elvt til so stóran skaða*

Mynd: Jens Kr. Vang

Benadikt Joensen sigur, at áðrenn farið varð undir at sleipa, varð sjógvurin fyrst pumpaður úr maskinrúminum og lastini, og hann heldur, at teir pumpaðu eini 40-50 tons úr maskinrúminum og umleið tað sama úr lastini.

- Tá sjógvurin í maskinrúminum var mestur, stóð hann upp á hálvan motorin, sigur skiparin á Grími Kamban.

### Ikki heilt galið

Síðan Brimil kom til lands viðísfiskatrolaranumsunnudagin, hava menn frá skipasmiðjuni Mest verið umborð, og tíbetur bendir alt á, at høvuðsmotorur og gear ikki hava fingið skaða av sjógvinum, sum var í motorrúminum.

Ljósmotorar og ein partur av el-instalatónunum mugu tó skiftast.

Eftir ætlan verður Grímur Kamban klárur til fiskiskap aftur um einar 10-14 dagar.




*- Tað vóru ymiskar samanfallandi umstøður sum gjørdu, at vit komu so illa fyri undir fiskiskapi, sigur Benadikt Joensen*

Mynd: Jens Kr. Vang